# Nógvir føroyingar á Heavy X-mas

**Dio og Uriah Heep eru nøvn, sum hava sett sín dám á føroyskan tónleik, ið øllum førum um man skal døma eftir mongdini av føroyskum tónleikarum á konsertini hjá hesum báðum bólkum leygarkvøldið**

KONSERT

*Orð og mynd: Niels Uni Dam*
*niesluni@sosialurin.fo*







Tá Dio, Uriah Heep og Asia framførdu á Heavy X-mas konsertini í leygarkvøldið var tættleikin av føroyingum væl hægri enn á einum vanligum tónleika tiltakið. Har ýddi stutt sagt í føroyingum, og bróðurparturin var føroyskir tónleikarar.

Har vóru nógvir útisetar, men eisini fleiri, vóru komin úr Føroyum til konsertina. Serliga Dio var framúrskarandi, og konsertin gjørdist ein nostalgisk ferð gjøgnum Dio klassikarar og løg úr døgunum í Black Sabbath og Rainbow. Persónligu hæddarpunktini fyri meg vóru Black Sabbath løgini Voodoo og Heaven And Hell, Raibow løgini Long Live Rock'n'Roll og Man On The Silver Mountain umframt Dio løgini Rainbow In The Dark og sjálvandi Holy Diver.

Konsertferðin hjá Dio, ið Heavy X-mas er ein partur av, eitur Holy Diver Tour 2005. Hetta hóast 22 ár eru liðin síðan Holy Diver varð útgivin.

Asia spældu sín symfoniska rokktónleik, og her var tað serliga einasta veruliga hittið hjá bólkinum "Heat Of The Moment", ið skaraði burtur úr.

Eisini hjá Uriah Heep vóru tað hittløgini "Lady in Black" og "Easy Livin'" í fingu stóru smílini fram hjá áskoðarunum. Men tað var eingin ivi um, at Dio var, bæði tann best upplagdi og best umtókti bólkurin hetta kvøldið.

Ronnie James Dio hevur megnað at hildið sítt føðiár loyniligt, men hann er føddur í 1940'unum. Hann stovnaði sín fyrsta bólk í 1957. So hann er ivaleyst um tey seksti, men hetta hoyrdist ikki á honum. Hann ljóðar sum fyrsta dagin.

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag



Vika 49 2005

# Evropiska rentan upp frá botninum

MARKNAÐARRÁK

Farna vika floymdi yvir av týdningarmiklum hendingum. Í USA varð millum annað kunngjørt, at búskapurin vaks skjótari enn áður mett í 3. ársfjórðingi, samstundis sum prísvøksturin slakkaði av. Í Evropa vístu hagtølini somu gongd, tó í nógv minni mun enn í USA. Størsta hendingin í vikuni var tíðindafundurin hjá ECB, eftir at rentan var hækkað úr 2,00% til 2,25%. Sjálv rentuhækkingin var væntað, men stórur spenningur var um, hvat ECB-stjórin, Trichet, fór at siga um framtíðarútlitini. Hann legði dent á, at rentan varð hækkað fyri at fyribyrgja stórum prísvøkstri. Sostatt eru ikki tikin serlig atlit til, at búskaparvøksturin bert er 1,6%. Prísvøksturin er í løtuni 2,5%, og ECB hevur sum mál at hann skal vera 2,0%. Trichet legði aftrat, at ECB ikki ætlar at hækka rentuna mekaniskt, eins og Fed í USA hevur gjørt.

### Lánsbrævarentur støðugar

Lánsbrævarenturnar vóru støðugar í farnu viku. 10-ára danska rentan lá alla vikuna um 3,40%. Marknaðurin hevði væntað, at ECB fór at hækka rentuna, og tí fekk sjálv hækkingin onga ávirkan á lánsbrævarenturnar.

### TDC fer av marknaðinum

Størstu tíðindini á danska partabrævamarknaðunum í farnu viku vóru, at nógv umtalaða keypsboðið uppá gamla danska monopol fjarskiftisfelagið TDC, varð kunngjørt. Leingi hevur verið bíðað eftir boðnum, og seinastu tríggjar mánaðirnar hevur dúgligani verið gitt nær eitt endaligt boð fór at koma. Hesar tríggjar mánaðirnar er kursurin á TDC hækkaður 39% úr 271 í 377. Tey, ið ætla at keypa TDC er ein bólkur, sum er mannaður av fimm feløgum, og tey hava boðið kurs 382 fyri øll partabrøvini. Samlaða boðið uppá TDC ljóðaði uppá slakar 100 mia. krónur. Fyri danska partabrævamarknaðin metir Kaupthing tað vera óheppið, at hesi keypa TDC, tí lítil ivi er um, at TDC innan leingi verður tikið av danska marknaðinum. Danski marknaðurin verður tí minni fjølbroyttur framyvir.

### Hesa vikuna

Hesa vikuna koma fá t‡ðandi lyklatøl, og tí fer vikan helst at ganga við at sodna øll tíðindini í farnu viku.

Donsk 10-ára renta




Vísital fyri norrøn partabrøv




**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| USD | 636,02 | 0,0% | ↑ |
| JPY | 5,28 | -0,8% | ↓ |
| GBP | 1.102,34 | 1,1% | ↑ |
| NOK | 94,03 | -0,8% | ↓ |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 104,54 | 0,1% | ↑ |
| Evru Lánsbrøv | 173,22 | -0,1% | ↓ |
| Norrøn Partabrøv | 105,89 | 1,5% | ↑ |
| Altjóða Vøkstur | 72,74 | 1,6% | ↑ |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.*